# Undirhald frá Støkk í hálvleikinum

**Í hálvleikinum í dystinum í kvøld millum Føroyar og Týskland verða tað gentur úr fimleikafelagnum Støkk á Glyvrum, sum koma at undirhalda saman við oyggjaleikalandsliðnum í fimleiki. Gentuliðið hjá Støkk skal í summar eisini luttaka á eini fimleikastevnu í Alicante í Spaniu**

FIMLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Genturnar hjá Støkk skulu undirhalda í hálvleikinum á Tórsvølli í kvøld saman við oyggjaleikalandsliðnum í fimleiki. Harafturat skulu tær til eina altjóða fimleikastevnu í Spania í summar. Genturnar eru: Súsanna Thomassen, Monika Weihe Poulsen, Karla Maria Gaardbo, Jenny á Reynatrøð, Jónvá Joensen, Joan Simonsen, Bodil Tausen, Kristina Olsen, Ann Mari Róin Johannessen, Anna Joensen, Sonja Joensen, Hervør Heinesen, Rósa Heinesen, Henny Joensen. Venjari: Rannvá Troest*

Tað verður gentuliðið hjá Støkk, sum skal undirhalda áskoðarunum í hálvleikinum millum Føroyar og Týskland á Tórsvølli í kvøld. Gentuliðið er mannað við 14-17 ára gomlum gentum úr fimleikafelagnum, og skulu tær saman við oyggjaleikalandsliðnum í fimleiki syrgja fyri, at føroysku og týsku áskoðararnir hava okkurt at hyggja eftir, meðan leikararnir hvíla seg og tosa um taktikk í hálvleikinum.

– Vit vórðu bidnar um at luttaka saman við oyggjaleikalandsliðnum vegna fimleikasambandið, sigur Rannvá Troest, venjari hjá gentuliðnum.

Talan verður helst um eina rútmiska seriu av einum ella øðrum slag, sum genturnar fara at framføra.

### Til Spania

Sjálvandi er tað eitt upplivilsi at sleppa at framføra til størsta fótbóltsdystin nakrantíð í Føroya fótbóltssøgu, men tað er ikki tað einasta, sum liggur gentuliðnum fyri framman í løtuni. Tær skulu nevniliga til Spaniu í juli mánaði at luttaka á eini altjóða fimleikastevnu í Alicante.

– Hendan stevnan hevur verið einaferð fyrr, og tað var í 1995. Tá var eitt lið úr Føroyum eisini við. Tað er DGI, Dansk Gymnastik og Idræt, sum saman við Alicante, skipa fyri, greiðir Rannvá Troest frá.

Ferðaliðið við fimleikarunum fer avstað 14. juli og kemur aftur tann 21. juli. Sjálv stevnan er seks dagar long.

Heili 3000 fimleikarar hava teknað seg til stevnuna. Teir flestu fimleikararnir eru úr Danmark og Spania, men umframt hetta, so eru gestalið úr øllum heiminum.

– Á stevnuni skulu genturnar framføra tvær ferðir á strondini. Tað ber til at tekna seg til workshops har, og so ber eisini til at ganga til framsýningar og á tann hátt eisini fáa íblástur, sigur Rannvá, sum ásannar, at ein slík stevna hjálpir nógv, tá tað kemur til íblástur.

Gentuliðið hjá Støkk hevur umboðað felagið í rútmiskum fimleiki tey seinastu fimm árini, og í teimum kappingunum hava genturnar fingið góð úrslit.

Saman við foreldrum hava genturnar teir seinastu fýra mánaðirnar savnað saman pening til ferðina niður til Spaniu. Harafturat fær liðið eisini stuðul frá Støkk og Fimleikasamabandi Føroya.

Ferðalagið sum fer til Spania í summar telur 31 fólk, harav eru 14 fimleikarar. Restin eru foreldur og áhugað.

# Oyggjaleikirnir eru hæddarpunktið

**Henrik Bertelsen, venjari hjá føroyska oyggjaleikalandsliðnum í fimleiki, ásannar, at oyggjaleikirnir eru hæddarpunktið hjá føroyskum fimleikarum. – Føroyskir fimleikarar í Danmark kunnu fara til Nordisk mesterskab og so víðari, men fyri fimleikarar í Føroyum, sláa oyggjaleikirnir alt, sigur landsliðsvenjarin**

FIMLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Føroyska fimleikalandsliðið venur í hesum døgum til oyggjaleikirnar*

**Rituvíkarhálsur:** Leygardagur er, og oyggjaleikalandsliðið í fimleiki venur á Rituvíkarhálsi. Tey fyrireika seg til oyggjaleikirnar, sum í ár verða á Guernsey.

Henrik Bertelsen, venjari hjá føroyka oyggjaleikalandsliðnum í fimleiki, er komin til Føroya at fyrireika fimleikararnar til teir fara avstað um ikki so heilt langa tíð.

– Eg var eisini við til at fyrireika fimleikararnar seinastu ferð tað vóru oyggjaleikir, og samstarvið hjá okkum hevur hildið fram í jøvnum millumbilum síðani tá, sigur Henrik Bertelsen.

– Í ár eru vit so byrjað nógv fyrr enn vit gjørdu seinast, og eg vóni, at hetta samstarvið verður fast, so vit kunnu byrja so tíðliga sum møguligt at finna teir evnaríku fimleikararnar.

### Marit skadd

Føroysku fimleikararnir hava verið millum tey ítróttarfólkini, sum hava verið rættiliga dugnalig til at fáa Føroyum heiðursmerki til vega, og venjarin dylir ikki fyri, at hann væntar okkurt heiðursmerki eisini í ár.

– Tíverri eru vit komin soleiðis fyri, at okkari besti fimleikari, Marit Magnussen, er skadd í krossbandinum. Hon verður tí ikki við, og hetta hevur tí minkað okkara málsetning eitt sindur. Bæði fyri liðið og fyri einstaklingar, ásannar landsliðsvenjarin.

– Men eg ivist ikki í, at liðið fær eina rímiliga plasering, men um tað verður nóg mikið til eitt heiðursmerki, veit eg ikki nú. Teir mannligu fimleikararnir hava fingið fleiri heiðursmerki undanfarin ár, men hetta er ikki tað vit fyrireika okkum uppá.

– Vit skulu gera okkara venjingar 100%, og so kunnu vit gera ein rokniskap aftaná, hvørt tað verður til eitt heiðursmerki ella ikki. Men tað verður ikki við heiðursmerkjum í eygunum, at fimleikararnir fara at framføra.

Fimleikalandsliðið er stórt sæð tað sama í ár, sum seinst, umframt at Gutti er komin við afturat. Vant hevur verið javnan síðani oktober mánaða, og nú verður tann seinasta hondin løgd á venjingarnar.

– Tað krevur ein harðan innsats. Tann seinasta mánaðan undan oyggjaleikunum hava fimleikararnir vant eftir eini ætlan, sum teir skulu halda dagbók eftir. Venjingin er hørð, men tað er har heiðursmerkini verða vunnin. Um tú ikki fyrireikar teg væl, so fyrireikar tú teg til fall, sigur Henrik Bertelsen.

Henrik Bertelsen er dani, og síðani í heyst hevur hann verið í Føroyum og vant við landsliðnum umleið 14. hvønn dag ella minst einaferð um mánaðin.

– Mær dámar væl at koma upp her og venja við fimleikarunum. Eg var saman við liðnum í Danmark á páskum og tá fingu vit hjálp frá einum russiskum koreografi.

Nakrir skaðar hava verið, men burtursæð frá Marit Magnussen, so verða allir fimleikararnir klárir til oyggjaleikirnar, um ongin nýggjur skaði tekur seg upp, væl at merkja.

# Kom bara við Ballack

**Fyrst og fremst var trupulleikin í Íslandi, at vit gúppaðu ov nógv, og tað mugu vit sleppa undan móti Týsklandi, heldur Fróði Benjaminsen, sum annars tykist gleða seg at hitta Michael Ballack**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*




*- Tá tú spælir móti slíkum leikarum, so fer tað neyvan at loysa seg at hugsa alt ov nógv um, hvørjum tú ert ímóti, heldur Fróði Benjaminsen um útlitini til aftur at hitta Michael Ballack*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast broytingar, so var Fróði Bemjaminsen sum vant partur av føroyska miðvøllinum móti Íslandi, og tá vit hittu hann mánadagin duldi hann ikki fyri, at hann hevði havt betri dystir enn hendan.

- Tað var fyrst og fremst tí, at vit sóu bóltin so lítið. Frá báðum síðum varð miðvøllurin at kalla alla tíðina lopin um, og tó at betraðist í seinna hálvleiki, so var tað framvegis ikki nóg gott.

Spurdur, hvørt hetta er nakað, sum teir á landsliðnum hava tosað um síðani, soleiðis at tað kann betrast mikudagin, sigur Fróði, at tað hava teir ikki.

- Tað fara vit nokk at gera týs- og mikudagin, men í øllum førum vita vit nú, hvat vit ikki skulu gera. Og serliga ikki móti týskarum, sum helst megna at seta størri trýst á, helt hann.

### Kom bara við Ballack

Tá Føroyar fyri knøppum ári síðani spældu í Hannover, var leikluturin hjá Fróða fyri tað nógva at ansa eftir Michael Ballack. Ein dystur, sum til tíðir tóktist ógvusligur, en hetta tykist tó ikki at nerva Fróða stórvegis.

- Nú má eg fyrst fáa at vita, um eg sleppi at byrja inni, men tað er so ikki nakað, sum eg hugsi stórvegis um. Tá tú spælir móti slíkum leikarum, so fer tað neyvan at loysa seg at hugsa alt ov nógv um, hvørjum tú ert ímóti.

Men hóast alt, so má Fróði tó viðganga, at tað sjálvandi er nakað serligt, tá spælt verður ímóti teimum stóru tjóðunum, men hann tykist á ongan hátt vera bangin fyri nærdystunum, sum ivaleyst fara at koma.

- Tað gekk kanska eitt sindur hart fyri seg millum okkum í Hannover, og Ballack var kanska eisini nokk so arrogantur. Tað veit eg so ikki, um hann eisini verður hesaferð, men verður tað soleiðis, so má mann bara taka tað við. Eg ætli mær so ikki at bakka, sigur ein smílandi Fróði Benjaminsen at enda, áðrenn leiðin aftur gekk niðan á Hotellið, har hvíld og matur nú vóru á landsliðsskránni.

# Fegin um møguleikan

**- Hetta hevði eg als ikki roknað við, men tað var ikki annað at gera, enn at royna sítt besta, helt Jann Ingi Petersen**

LEIKARASAMRØÐA
*Jákup Mørk*



*- Spælið lá ikki serliga væl til okkum á miðjuni, tað er jú munur á einum venjingardysti móti Kasahkstan og so einum undankappingardysti móti Íslandi. Men eg haldi, at eg spældi meg væl upp, helt Jann Ingi eftir dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var Jann Ingi Petersen, sum var stóra kaninin hjá Henrik Larsen, tá liðið varð sett til dystin móti Íslandi.

Frá flest øllum síðum varð roknað við, at tað skuldu verða Fróði Benjaminsen og Julian Johnsson, sum skuldu mannað føroyska miðvøllin, og hóast ein branddyst móti Kasahkstan herfyri, so segði Jann Ingi seg rokna við tí sama.

- Julian og Fróði hava verið somikið sterkir á miðvøllinum, at eg als ikki hevði roknað við nøkrum møguleika her og nú.

- Eg fekk tað heldur ikki at vita, fyrr enn stutt undan dystinum, og tí var eg kanska eitt sindur nervøsur, tá dysturin fór ígongd, men har var einki annað at gera, enn bara at royna sítt besta, helt Jann Ingi, sum annars helt, at tað var ein stór hjálp, at vanligi liðfelagin úr B68 var hin maðurin á miðvøllinum.

Tað tóktist eisini, sum hevði føroyski miðvallarin eitt sindur ilt við at koma inn í dystin, og hann viðgekk eisini, at hetta hevði verið strævið.

- Spælið lá ikki serliga væl til okkum á miðjuni, tað er jú munur á einum venjingardysti móti Kasahkstan og so einum undankappingardysti móti Íslandi. Men eg haldi, at eg spældi meg væl upp, áðrenn eg varð skiftur út.

Mikudagin er dystur móti Týsklandi, og til ta tíð verður ein av spurningunum heilt víst, hvussu føroyski miðvøllurin fer at síggja út.

Til hetta helt Jann Ingi, at tað má so verða upp til venjararnar.

- Tað hevði sjálvandi verið stuttligt, um eisini slapp við har, men lat okkum nú fáa at síggja. Enn eru nakrir dagar, til tann avgerðin skal takast, segði ein fegin Jann Ingi Petersen at enda.

# Pól ætlar sær sessin aftur

**Hóast avloysararnir gjørdu tað gott, so ætlar Pól Thorsteinsson sær beina leið inn aftur á føroyska liðið, nú stórdysturin móti Týsklandi stendur fyri framman**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Ein av leikarunum, sum nú er lagstur afturat landsliðshópinum, er Pól Thorsteinsson. Hann var leikbannaður til dystin í Íslandi, og mátti tí saman við Óla Johannesen fylgja dystinum uttanífrá. Tó at tað stóð teimum báðum í boði, so vóru teir ikki við í Íslandi, men komu ístaðin at føroyska hópinum leygardagin, tá gist varð í Vágunum.

### Ætlar sær sessin

Og at Pól er komin aftur á liðið fyri at verða, ivast hann ikki í sjálvur.

- Tað er rætt, at teir, sum komu inn í verjuna, spældu ein góðan dyst, men sjálvur rokni eg í øllum førum við, at eg skal byrja inni.

- Eg skal tó viðganga, at eg enn onga ábending havi fingið um hetta frá venjarunum. Talan hevur ikki verið um nakra venjing av dystarstøðum enn, so har hevur so einki verið at heintað í so máta.

Spurdur, um hetta ikki er ein dystur, har tað hevur serliga stóran týdning at byrja inni, tykist Pól eitt sindur ivandi, men hann viðgongur tó, at hetta er stórt.

- Tað er so nokk tann størsti dysturin, sum vit hava leikt á heimavølli. Eingin ivi um tað. Men hinvegin er hetta ikki nakað, sum tú hugsar stórvegis um, tá tú fert á vøllin. Hetta við at tað eru stórar heimsstjørnur, sum tú spælir ímóti.

- Vit hava jú verið í altjóða dystum somikið ofta, at tað ikki akkurát er tað, sum tú hugsar mest um. Tú ert kanska eitt sindur spentur undan dystinum, tá tú veitst at Kahn, Ballack og Klose eru millum mótstøðumenninar, men tá dysturin byrjar, er alt hetta burtur. Tá ræður bara um at gera sítt besta, líkamikið hvør mótstøðan er, sigur Pól Thorsteinsson at enda.




*Eftir fráveruna í Íslandi tykist Pól Thorsteinsson vera uppsettur upp á at vinna sær sessin í føroysku verjuni aftur*
*Mynd:Álvur Haraldsen*